NORÐOYA SPARIKASSI



*Anna hevur vunnið fleiri FM-heitið í flogbólti eins og hon eitt nú á føroyska flogbóltslandsliðnum hevur vunnið gull á trimum Oyggjaleikum.*
*Hví valdi hon at gerast næmingur í Norðoya Sparikassa?*

„...Eg valdi sparikassan, tí eg haldi, at sparikassin er eitt sera spennandi og avbjóðandi arbeiðspláss. Og eisini tí, at sparikassin bjóðar góðar útbúgvingarmøguleikar!"

# NÆMINGAR TIL DEILDIR OKKARA Í KLAKSVÍK, RUNAVÍK OG TÓRSHAVN

Ímyndið tykkum, tit hava fingið grundstykki og skulu nú fara at byggja. Tit hava avtalað tíð við kundaráðgeva tykkara í Norðoya Sparikassa, koma inn og verða boðin í SparCafé'ina, har kundaráðgevin tekur ímóti. Meðan børnini, ið bæði eru við, hugna sær í Silvahorninum, bíleggja tit okkurt gott úr café'ini. Konan fær ein cappucino og pannukøku við ísi, meðan maðurin fær ein kaffimunn og eina kransakøku. Eftir at hava prátað eina løtu um leyst og fast, fer prátið at snúgva seg um húsini, hvat tey væntast fara at kosta, hvat tit vilja sita fyri hvønn mánað, hvussu Heimlánið virkar o.s.f. Og eftir eina góða, upplýsandi og ikki minst, vælsmakkandi løtu, eru allar avtalur fingnar uppá pláss...



Hetta verður ein av framtíðar kundastøðunum í nýggju deild Norðoya Sparikassa í Miðlon í Havn í Heyst og sum fráliður eisini í Klaksvík og Runavík.

Nógv tíð og orka er løgd í at menna eitt nýtt konsept, har tað gerst ein góð uppliving við høgum tænastustøði og góðari ráðgeving, at støkka inn á gólvið í Norðoya Sparikassa. Og ein hin mest týðandi táttur í einhvørjum slógbrótandi virksemi eru starvsfólkini!

Ljóðar hetta áhugavert, les so víðari. Tí hevur tú eitt jaligt sinnalag, góð samstarvsevni, humor, lætt við at tosa við fólk og dámar at arbeiða sjálvstøðugt, er Norðoya Sparikassi kanska júst arbeiðsplássið fyri teg.

**Send umsókn til:**
**Norðoya Sparikassi**
**Att. Eyðun Nolsøe**
**starvsfólkaleiðari**
**Postboks 149**
**Ósávegur 1**
**FO-700 Klaksvík**



Í næmingatíðini ert tú partur av einum spennandi arbeiðsplássi, tú gongur í peningastovnsskúla og ert við í prógvgevandi lærugreinum. Lærutíðin er 2 ár og útbúgvingin gevur eisini góðar møguleikar fyri at útbúgva seg víðari á mongum økjum. Hevur tú lokið HH-, Students-, HF- ella tilsvarandi prógv og hevur hetta tín áhuga, so send okkum skrivliga umsókn saman við prógvum, har tú gevur okkum títt boð uppá hví vit skulu velja júst teg sum næming! Hevur tú eitthvørt at spyrja um, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Eyðun Nolsøe, starvsfólkaleiðara á tel. 475072, fartel. 775072 ella umvegis teldupost: eydunn@ns.fo

**UMSÓKNARFREISTIN ER 7. AUGUST 2006**

www.ns.fo

Norðoya Sparikassi Ósavegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík Tel. 475000 Fax 476000 ns@ns.fo